# Hugnaligur fimleikadagur



*Millum mongu kappingarnar, sum tey yngru høvdu á skránni, var sjálvsagt eisini togtugan*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

*Badminton høllin var stúgvandi full av ungum fimleikarum og foreldrum, og einki var at ivast í, at talan fyri øll var um ein sera hugnaligan dag*





*Talan var jú eisini um føstulávint, so sjálvandi skuldu andlitini hava eitt sindur av máling*

*So er at kvika sær víðari til næstu forðing...*



**Um vikuskiftið hevði fimleikafelagið Ljósið stóran fimleikadag fyri teimum yngstu í felagnum. Dagurin var samstundis eitt framhald av 25 ára degi felagsins**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*

Tað var í fjør, at fimleikafelagið, Ljósið, í Havn kundi halda 25 ára føðingardagin, men hóast hetta varð hildið í nógvar mátar, so tykist føðingardagurin at halda fram.

Tað var nevnliga soleiðis, at meðan nógv varð gjørt burtur úr vaksnu fimleikaranum hjá felagnum í fjør, millum annað við gallaveitslu og fimleikaframsýnin, so varð lítið gjørt, fyri at tey yngstu skuldu kenna, at hetta eisini var teirra føðingardagur.

Ætlanin hevur tó alla tíðina verið, at eisini hesi skuldu hava okkurt at síggja fram til, og seinasta vikuskiftið skipaðið Ljósið so fyri einum sokallaðum fimleikadegi, sum serliga varð ætlaður teimum yngstu í felagnum.

## Hugnaðu sær

Fyri tað mesta, fór tiltakið fram í Badmintonhøllini, har hópin av børnum í aldrinm 4-10 ár vóru savnaði. Fleiri spæl vóru á skránni hjá hesum, og ikki minst var spenningurin stórur, tá tey fóru at kappast á sonevnda rasarabreytini. Talan var her um eina breyt, sum varð gjørd við ymsum forðinum í formi av fimleikaamboðum á vegnum. Til ein rasarabana hoyrir sjálvsagt eisini eitt pit-stop til, og eisini her skuldu luttakararnir, tó at tað ikki var dekk- og oljuskift, sum her vóru á skránni.

Tey eitt sindur eldru hugnaðu sær samstundis uttanfyri. Bæði á fótbóltsvøllinum í í Viðarlundini, og tó at tað var heldur kalt í veðrinum, so tóktist hetta ikki at bila tað stóra. Ikki minst tí allir luttakararnir fingu bæði pylsur og sunkist aftaná.

Hesum seinasta høvdu foreldur og onnur avvarandi syrgt fyri, og sjálvsagt var eisini hópur av køkum bakaðar, eins og kannur við kaffi og the vóru frammi, soleiðis at dagurin alt í alt kundi gerast ein veruligur hugnadagur fyri alla familjuna.

# Todi millum málskjúttarnar

**Samstarvið við Zuma riggaðu framúr væl, tá tað týsdagin varð tikið uppaftur í Suðurafrika**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað var sum í tíðini uppundir, at FCK vann nógvu stigini, sum bóru meistaraheitið við sær fyri einum stórum hálvum ári síðani. Tá var tað serliga álopsparið Todi Jónsson og Sibusisu Zuma, sum gjørdi um seg og skoraði flestu málini. Soleiðis var tað aftur, tá FCK týsdagin spældi venjingardyst í Port Elizabeth í Suðurafrika. Mótstøðuliðið var Hellenics. Venjari hjá hesum liðnum, sum verður roknað at vera millum fýra tey bestu í bestu deildini, er Bruce Grobleaar. Hann var í síni tíð málverji hjá Liverpool, tá teir fyri einum 15–20 árum síðani vunnu so nógv gull og skreyt..

FCK vann 5–0. Todi Jónsson hevur ikki verið á liðnum í tað nógva av einum ári. Zuma hevur ikki verið við í fyrstu fyrireikingunum til nýggja kappingarárið. Hann hevur verið á suðurafrikanska landsliðnum, sum rakk fjórðingsfinaluni í kappingini um afrikanska meistaraheitið.

Týsdagin vóru Zuma og Todi aftur fremstu FCK menninir, og tað hilnaðist so væl, sum tað gjørdi síðsta vár. Úr Suðurafrika verður sagt, at FCK í 1. hálvleiki spældi við bestu uppstillingini: Den gamle angrebskonstellation med Zuma og Todi var utrolig giftig og voldte modstanderne store problemer, verður sagt.

Todi Jónsson spældi bara 1. hálvleik. So loysti Peter Møller hann av. Tá Todi varð skiftur út, hevði hann skorað eitt mál. Støðan var 2–0. Hitt málið hevði Morten Bisgaard skorað. Í 2. hálvleiki skoraði Zuma tvær ferðir, og Thomas Røll skoraði eitt mál.

## Spardu Toda

Tað tykist sum um FCK og Todi gera alt fyri at sleppa undan møguligum nýggjum lærskaðum. Sum sagt so spældi Todi bara við í 1. hálvleiki í Port Elizabeth. Mánadagin spældi FCK fyrsta venjingardystin á ferðini í Suðurafrika. Tá taptu teir 1–0 ímóti Park United. Tá var Todi ikki við. Á heimasíðuni hjá FCK varð upplýst, at teir spardu Toda, tí hann hevði verið eitt sindur eymur í lærinum.

FCK verður í Suðurafrika eina viku afturat, og teir skulu spæla fleiri venjingardystir, áðrenn teir skulu flúgva longu leiðina úr afrikanska summarhitanum og frá grønu og sløttu fótbóltsvøllunum og norður í europeiska veturin og til hørðu og skallutu grasvallirnar í Danmark.



ELEKTRON

## FÍGGJAR- OG FYRISITINGARLEIÐARI

**Til fíggjar- og fyrisitingardeild okkara, leita vit eftir einum sjálvstøðugum og væl skipaðum leiðara, sum er opin og samstarvssinnaður.**

Á deildini starvast 4 fólk og uppgávurnar fevna um:
- Dagligu roknskaparføringina
- At gera roknskapin fyri fyritøkuna, bæði tann leypandi roknskapin og ársroknskapin
- At gera rakstrar- og gjaldførisætlanir
- Rakstur av ognum
- Rakstur av móttøku og matstovu
- At menna mannagongdirnar á fíggjarøkinum

Um tú hevur áræði at arbeiða undir skiftandi umstøðum, og hartil hevur yvirskot at hugsa fram eftir og vera við til at seta í verk ábøtur í innanhýsis arbeiðsháttum, ert tú kanska rætti persónurin til starvið.

Talan er um eitt avbjóðandi og krevjandi starv, sum krevur munagóða útbúgving og viðkomandi starvsroyndir.

Tú verður partur av leiðslubólkinum og kemur at luttaka í áhaldandi menningini av Elektron.

Setanar- og lønarviðurskifti verða ásett eftir nærri avtalu.

Starvið verður sett skjótast til ber, men vit eru sjálvsagt sinnaði at bíða nakað eftir rætta persóninum. Umsøknir við avritum av prógvum og møguligum viðmælum skulu stílast til Niels Chr. Nolsøe, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. februar 2002.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Niels Chr. Nolsøe, á telefon 314505 ella 316658 ella við e-brævi til ncn@elektron.fo.

**PF ELEKTRON**
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 3219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384

stephanssons hús

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekninskum og handilsligum viðurskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum. Størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri. Á P/F Elektron starvast umleið 60 fólk og nettoumsetningurin var umleið 46 mió. kr. í 2001.

Í BÝIN
- HVØNN HÓSDAG

Toll- og Skattstova Føroya

## *Deildarstjóri*

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 30 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

Starvið sum deildarstjóri fyri Eftirlits- og innheintingardeildini í Stýrinum á Argjum verður hervið leyst at seta í seinasta lagi 1. apríl 2002.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:**
- dagliga leiðslan av deildini við ábyrgd yvir fyri stjórnini,
- umsiting og serkunnleiki í eftirlits- og innheintingarmálum,
- at gera og leggja til rættis vegleiðingar- og rundskriv um krøv til skattaroknskapin, meirvirðisgjaldsroknskapin, og tollfakligar spurningar í samband við eftirlit,
- at geva fakliga leiðbeining til økini í sambandi við roknskapareftirlit og innheinting,
- vinnugreinaeftirlit og grannskoðan av truplum málum og av málum, sum økini vegna lokalpolitiska orsøk ynskja at flyta til Stýrið,
- at undirvísa starvsfólkum í nýggjum reglum og arbeiðshættum í virkiseftirliti og innheinting
- at skifta upplýsingar við útlond,
- at gera úrvalsmøguleikar og hjálpiamboð til økini og
- at umsita og menna vegleiðing til samskipað eftirlit og innheinting.

**Førleikakrøv**
Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur roknskaparliga útbúgving, eitt nú cand. merc. ella aðra hægri roknskaparella revisiónsútbúgving. Tú skalt hava góð leiðaraevnir, kunna arbeiða saman við øðrum og eisini sjálvstøðugt. Arbeiðsroyndir við tolli-, mvg- og skattamálum er ein fyrimunur.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi, har tú sjálv/sjálvur leggur dagliga arbeiðið til rættis.
Vit hava flextíð á arbeiðsplássinum.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.
Núverandi setanarøki er í Stýrinum á Argjum, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastur á hesum støðum, um tað verður kravt.

Á eftirlitsdeildini eru í løtuni 4 starvsfólk, sum tú kemur at hava eitt tætt samstarv við.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at venda sær til Stýrið, Regin Thomsen ella Óla Heinesen, tlf. 35 26 00.

**Umsóknir:** Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Stýrinum í hendi í seinasta lagi

**25. februar 2002**

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postsmoga 2151
FO-165 Argir

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

## Føroya Psykiatrifelag - Eykaaðalfund

Eykaaðalfundur verður í dag 14. februar 2002.

Fundarskrá: Lógarbroyting.

**Nevndin**